# Vøkstur í dygd og mongd

MUSIKSKÚLA-SKIPANIN

*Martin Mouritsen, leiðari*
*Myndir: Jens Kr. Vang og Ulf Nordlund*

Verkætlanin við næmingum í musikkskúlaskipanini og Føroya Symfoniorkestri var sunnudagin 30. Mars í høllini í Norðurlandahúsinum. Aðalmálini vóru tvinni, annað at næmingar fingu høvi at framføra fyri nógvum áhoyrarum, og hitt at skapa samband millum næmingar og tónleikalív.

Fyrru konserthálvu spældu einstaklingar á floytu, trompet, trombon, cello, vciolin og klaver, og Jóhannes Andreasen hevði klaverfylgispæl við teim flestu. Ólavur Jacobsen leikti á fuitar við tveimum floytuleikarum.

Hóast konsertin var nakað drúgv, tóktust serliga yngru leikararnir at njóta løtuna. Framburðurin er eyðsýndur, og yvirhøvur vóru hesir ungu tónleikararnir púra tryggir og í fleiri førum er greitt, at evnini eru til framhaldandi menning aðrastaðni. Ein teirra, trompetleikarin Johan Hentze, byrjar longu í september á Royal Scottish Academy of Music í Glasgow.

Tey ið framførdu, vóru Jona Jacobsen og Jón Festirstein Andreasen á violin, Sindre Malmsten Steinkopf og Andreas Restorff á cello, Morid Simonsen, Maria Tausen, Mia Káradóttir, Ruth á Plógv, Katrin á Borg Gaard og Marianna W. Jacobsen á floytu, Kristina Dalsgarð á klaver, Dávur Juul Magnussen á trombon og Brandur Olsen á gittar.

Í seinna parti luttók symfoniorkestrið og tilsamans vóru 40 næmingar við á violin, viola, cello, kontrabass, floytu, klarinett, fagott, waldhorn, trompet, trombon, tuba, trummum, slagverki og hørpu.

Yngru tónleikararnir upplivdu samanspæl í symfoniorkestrinum og tað tóktist at huga teimum, ikki minst í brotunum úr sættu symfoniini eftir Tschaikovsky.

Føroya Symfoniorkestur hevur eins og Musikkskúlaskipanini 20 ár á baki, og tíðin er búgvin til at gera eitt ungdónssymfoniorkestur. Fyrireikingar eru í løtuni til at gera eitt stuðlafelag til endamálið. Frammanundan er eitt barnasymfoniorkestur úr øllum musikkskúlanum í landinum, sum venur regluliga.













